# Fundarfrágreiðing til HSF-limafund hósdagin 22. mai 2024

Luttakandi: Gunn Ellefsen, Jógvan Emil Nielsen, Heini Ellingsgaard, Durita Thomsen og Birgir Kass fyri Starvsnevndina. Høgni Vilhelmsen og Eyðun Mortensen fyri Kappingarnevndina. Thomas Juul Thomsen fyri Dómaranevndina. Ári Rouch, Mark Lausen-Marcher, Hallur Danielsen og Andrass Thomsen fyri umsitingina. Hans Andreas Dahl fyri EB. Tóra Seloy fyri VÍF. Karstin í Húsinum og Magnus Jacobsen fyri KÍF. Annika Arge fyri Stjørnuna. Eyðun Mortensen fyri Kyndil. Eyðun Joensen, Alfred Jacobsen og Anna Dam fyri H71. Sólja Jóanisdóttir og Katrin Pauladóttir fyri SÍF/Søljuna. Helena Kallsberg fyri Team Klaksvík. Gestir vóru Tróndur Joensen og Ári Dam. Ikki umboðaði ÍA, Neistin og StÍF.

Andrass Thomsen, stjóri, beyð vælkomin og gjøgnumgekk skránna.

**1.0 Framløga um tvørfelagssamstarv, Tróndur Joensen og Ári Dam**
G12-venjararnir, Tróndur Joensen og Ári Dam, úr H71 løgdu fram um alternativa kapping, ið venjarar tóku stig til eitt vikuskifti, har ongin landskapping var á skránni. Endamálið við framløguni var at skapa íblástur til, hvussu feløgini saman kunna skipa fyri virksemi aftrat verandi lands- og steypakapping, ið HSF skipar fyri.

**1.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu framløguni gætur.

**2.0 Samanumtøka og eftirmeting av kappingarárinum 2023/24**
Ári Rouch legði fram vegna Kappingarnevndina, sum var, sum heild, vælnøgd við kappingarárið. Hetta var fyrsta kappingarárið við U9-deildini og stuttvølli og hava afturmeldingarnar verið góðar. Semja var um, at halda fast við leistinum, men at í betri mun tryggja, at U9 og U10 umfør ikki liggja sama dag.

Ári vísti eisini á, at ávísir bólkar hjá U14 kundu hepnast betur, har nøkur lið tíverri trekti seg úr kappingini og bólkarnir blivu ov smáir á 4 og 5 lið. Tað skulu helst verða minst 6 lið í hvørjum bólki. Kappingarleiðslan skal eisini gera sær stóran ómak, tá bólkarnir verða gjørdir, soleiðis at tað verður tryggjað, at liðini eru í røttum bólki.

Tað er gleðiligt, at talið av liðum í 2. deild er hækkandi, men skal finaludagurin hjá 2. deild skal helst ásetast fyrr, soleiðis at liðini fyrr vita, hvar leikt verður.

**2.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur og viðkomandi kjak, viðmerkingar og spurningar vóru eftirfylgjandi.

**3.0 Uppskot til samtyktar um broytingar fyri U16 deildina viðv. leikbrá og at seta eyka leikara inn, tá liðið hevur eina ella fleiri útvísingar**
Talan var um uppskot, sum var viðgjørt á undanfarna limafundi, har skotið var upp, at §4 og §6 í ”Serreglur fyri aðrar deildir” var broytt soleiðis, at U16-deildin kann taka time-out og taka málverjan út og seta ein eyka útileikara inn á vøllin, tá liðið hevur eina ella fleiri útvísingar.

**3.1 Niðurstøða**
Uppskotið var samtykt og sendir umsitingin kunning út um hetta til feløgini.

**4.0 Leiðreglur viðv. flytan av dystum orsakað av námsferðum**
Ári Rouch vísti, vegna Kappingarnevndina, á leiðreglurnar í sambandi við flyting av dystum í fremstu deildunum í sambandi við námsferðir. Kappingarnevndin ynskti í hesum sambandi eina nágreinan av leiðreglunum, har søkjast kann um flyting tveir ferðir um árið. 1. sepetember fyri kappingarbyrjan og 1. januar í kappingarárinum.

Orsøkin til nágreiningina er, at ávís feløg hava søkt um at útseta dystir orsakað av námsferð við sera stuttum skotbráði, har tað hevur verið trupult at áseta útsetta dystin.

**4.1 Niðurstøða**
Broytingaruppskotið var samtykt.

**5.0 Álmanakkin**
Ári Rouch, kappingarsamskipari, legði fram álmanakkan fyri kappingarárið 2024/25 fram. Álmanakkin verður lagdur á heimasíðuna í næstum og fer eisini at koma ú fyri kappingarbyrjan í einari lættari grafiskt, lesiligari i útgávu.

**5.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**6.0 Dómaranevndin – tilgongd at dómarum**
Ári Rouch, dómarasamskipari, legði fram vegna Dómaranevndina. Støðan við dómarum í fremstu deildunum er viðbrekin. 13 dómarar hava dømt í vetur, har miðalaldurin er 48 ár. Fyri at bøta um støðuna ynskir Dómaranevndin at seta ein dómaramennara og hevur starvslýsing verið í miðlunum. Tíverri var eingin umsøkjari, men er nú hugsanin at vitveiða viðkomandi. Sum dómari ert tú partur av einum jaligum felagsskapi, har tað er gott samanhald og møguleiki fyri altjóða avbjóðingum. Døming er eisini møguleikin fyri einari góðari hjáinntøku, har fleiri dómarar liggju upp ímóti 50.000 um árið. Talan kann verða um ítróttasamsýning, sum er skattafrí.

Ári kunnaði eisini um, at HSF til komandi kappingarár fer at krevja at feløgini hava ein dómaramennara/samskipara í feløgunum, sum er í sambandi við HSF um ásetingar, sparring og møgulig skeið. Eisini fer HSF at krevja, at øll feløg, sum hava lið í fremstu deildunum, tilmelda minst eitt dómarapar til komandi kappingarárið. Hesir skulu lúka treytirnar fyri at verða B-dómarar.

**6.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**7.0 live.hsf.fo**
Hallur Danielsen kunnaði um gongdina og legði tølini fyri 2023/24 fram. Live.hsf.fo gav aftur í 2023/24 eitt lítið yvirskot. Eisini var kunnað um ætlanir at seta eina nevnd við umboðum úr feløgunum og HSF, sum skal varða av og menna live.hsf.fo. Arbeiðið við at fáa betri grafikk og tøl til dystirnar gongur væl.

**7.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**8.0 Leikaramenning 2024/25**

Mark Lausen-Marcher, ítróttastjóri, legði fram. Mark vísti á nakrar broytingar í mun til hvussu leikaramenningini verður skipað komandi kappingar, men er talan um smávegis tillagingar.

**8.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**9.0 Kunning um venjaraútbúgving**
Mark Lausen-Marcher, ítróttastjóri, kunnaði um arbeiði við at skipa eina føroysku venjararútbúgvinga betri. Talan verður um arbeiði, sum skal raðfestast komandi tíðina.

**9.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**10.0 Kunning í sambandi við aðalfundin**
Andrass Thomsen, stjóri, kunnaði um ymiskt í sambandi við aðalfundin, sum verður leygardagin 1. juni á Giljanesi.

**10.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**11.0 Innkomið mál – viðvíkjandi neti inni í málinum**
VÍF hevði sent inn mál til limafundin, har felagið spyr, hvørt tað er gjørligt at taka netið, ið hongur inni í málinum, úr, tá ið dystir verða spældir.

Umsitingin hevur kannað málið, og er tað ikki eitt krav, at tað er eitt fanganet inni í málinum. Okkara grannalond, Danmark og Ísland, hava heldur ikki ásetingar hesum viðvíkjandi.

**11.1 Niðurstøða**
Um feløg ynskja at taka fanganetið úr málinum, so er hetta gjørligt í mun til reglurnar.

**12.0 Innkomið mál – broyting av U14 kappingarleisti**
SÍF/Søljan hevði sent fyrispurning inn, hvørt tað var áhugi millum feløgini at skipa U14-kappingina eftir sama leisti sum hjá U12 og U10, har fyrireikingarkapping verður leikt fyri ársskiftið og FM-kapping eftir.

Kappingarnevndin og ítróttastjórin mælti frá hesum. Størri umsiting er við at bróta kappingarnar upp, og er eisini ein vandi í at taka kappingarelementi úr fyrru helvt av kappingini, hetta tá tey ungu er vorðin meira bevíst um hetta, tá tey eru blivin 13-14 ár.

**12.1 Niðurstøða**
Undirtøka var ikki fyri at broyta kappingarleistin.

**Fundarskrivari:**
Ári Rouch